# FM fyri handverkslærlingar

Góðan morgun øll somul!

Herfyri var ein fólkaskúlalærari her í høvuðsstaðnum á verkstaði við bilinum. Hann skuldi ordna nøkur smáting. Verkstaðið tók bilin, og lærarin fekk at vita, at hann kundi fáa bilin aftur seks vikur seinni. Hetta fekk hann at ilskast: Heilar seks vikur fyri at ordna nøkur smáting!

Men á verkstaðnum søgdu tey bara: “men tú hevur sjálvur skyldina! Um tú og allir aðrir lærarar ikki høvdu sent allar fólkaskúlanæmingar í student, høvdu vit fingið lærlingar og harvið starvsfólk at umvæla bilin hjá tær. Tí tað tekur bara ein tíma at ordna, men vit hava ikki fólk tøk at gera arbeiðið”.

Hendingin á bilverkstaðnum hendan dagin er rættiliga sigandi.

Hon sigur rættiliga væl um okkara skeikla̋ða útbúgvingarpolitikk. Og hon sigur rættiliga nógv um stóra týdningin av at hava hollar handverkarar.

Rákið er greitt. Alsamt fleiri ung velja gymnasialu miðnámsútbúgvingarnar, meðan færri velja yrkisútbúgvingar. Bara í fjør vóru tað 86% av einum árgangi, sum tóku gymnasialt miðnám.
Og hví gera tey tað?

Ein orsøk er, at tað í nógv ár hevur verið ein grundfatan, at tað er ”fínari” og ”betri” at fara niðan í Hoydalar at lesa um Aristoteles, týskar hvørjumfals bendingar og at loysa líkningar enn at halda í einum meitili, einari sag ella at skifta eitt útstoyt í einum bili.

Sjálvur eigi eg tveir dreingir í fólkaskúlanum, og mín varhugi er, at føroyski fólkaskúlin í stóran mun er blivin ein fyrireiking til miðnám. Heldur enn at fyrireika næmingarnar til at klára seg á arbeiðsmarknaðinum, læra næmingarnir í størri mun at ganga í skúla. Stór orka verður løgd í at útvega øllum pláss á miðnámi, uttan at spyrja, um hetta er tað, ið øll hesi ungu hava bestan hug til.

Og meðan alsamt fleiri nema sær bókliga útbúgving, økist tørvurin á fólki við tekniskum og handaligum førleikum. Og hetta er ein trupulleiki – fyri vinnuna og sanniliga eisini fyri samfelagið.

Tað er ein stórur trupulleiki, tá ið tað gerast ov fá við handaligum førleikum at loysa tær mongu uppgávurnar í samfelagnum, sum byggi- og handverksvinnan annars loysa: byggja og umvæla bygningar, bilar, skip, vegir, tunlar. Harumframt eru nógvir aðrir handverkarar, sum okkum tørvar, so sum bakarar, konditarar, kokkar, reseptionistar, frisørar o.s.fr.

Og samstundis sum vit rópa við ein munn, at tað eru ov fáir handverkarar, so breggja vit okkum av at eiga bestu handverkarar í heiminum. Á norskum boripallum. Á altjóða hárfríðkanarstovuni Balmain. Umborð á Mærsk skipum ella á Michelin matstovum. Hetta eru okkara fólk, sum vera nógv eftirspurd úti í heimi, og sum vit her heima hava trupult við at halda uppá.

Eg haldi, at fyri at økja um áhugan og talið av handverkarum í Føroyum, er tað ein meginuppgáva at fáa greiðu á, hvussu yrkisútbúgvingar kunnu skipast, so tær økja um áhugan hjá ungdóminum. Tað er neyðugt at menna og fjøltátta yrkisútbúgvingarnar.

Ungdómurin eigur at vera spurdur, hvørjar yrkisútbúgvingar tørvur og áhugi er fyri, soleiðis at nýggjar útbúgvingar kunnu verða stovnsettar. Eisini er neyðugt at útboðið av hesum útbúgvingum gerst attraktivt og viðkomandi fyri bæði kynini. Sum nú er, eru tað heilt fáar gentur, ið fara yrkisvegin, hetta orsakað av vantandi valmøguleikum.

Kappingin, sum skipað verður fyri her í SMS komandi tveir dagarnar, er sanniliga eisini við til at fremja hugin hjá teimum ungu at velja sær yrkisútbúgvingarvegin sum yrkisleið. Fyrireikararnir eiga stórt rós uppiborið fyri at hava tikið hetta stig.

At enda vil eg ynskja øllum tykkum, sum kappast, bestu eydnu. Eg vóni, at nógv fólk støkka inn á gólvið at heppa á tykkum komandi tveir dagarnar!

Takk fyri!

*Aksel V. Johannesen*
*løgmaður*